# ítróttur

Nr. 63 • mikudagur • 29. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Hvør hevur »dagin«?

**Sunset-kappingin í hondbólti hevur higartil fevnt um 88 dystir. Tann 89. og seinasti verður spældur í Høllini á Hálsi kl. 19 í kvøld. Her verður alt kappingarárið sett upp á spíss í einum seinasta og altavgerandi dysti um gullið**


HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*





*Við sterku felagskensluni, sum hevur eyðkent Neista-liðið, hevur tað verið lætt at integrera »gamlar« útisetar aftur á liðið. Ein hesum er Birita Wardum, sum tó ikki hevur møguleika at spæla við í kvøld*

Tað ljóðar uttan iva sum ein slitin kliché, men tá talan er um finalur, so er talan samstundis um óreingiligan veruleika. Tað verður betra liðið á degnum, sum onkra staðni kring níggju-tíðina í kvøld kann rópa seg føroyameistara.

### Komplett lið

Undan kappingarárinum vóru tey flestu á einum máli um, at Stjørnan var stórfavorittur at vinna meistaraheitið. Sum verjandi meistarar høvdu VB mist ov nógv, til at fólk veruliga roknaðu við teimum, og hóast Neistin tóktist enn betri fyri, enn tær hava verið í fleiri ár, so var spurningurin, hvørt hetta veruliga var nóg mikið hjá teimum.

Við komplettu Alina Olaru, hartskjótandi Katarinu Stepanov, intelligenta og kvika spælinum hjá Joan Midjord Djordjevic, landsliðsspælarum á báðum vengrum og strikuna og ikki minst við Agnes Masenaite aftur í málinum tóktist idealuppstillingin hjá liðnum snøgt sagt at vera ein styrkisflokk oman fyri tí, sum hini liðini kundu stilla upp við.

Í grundspælinum koyrdi eisini við fullari ferð. Verður sæð burtur frá heilkiksaranum móti Kyndli í Havn, megnaði eingin at standa stjørnunum kurl, og fram til 11. februar tóktist eingin ivi vera um, at vit her tosaðu um sterkasta kvinnuliðið í landinum.

Sigurin hjá Neistanum í steypafinaluni tann dagin broytti tó um hesa fatan. Neistin hevði annars bæði hetta og seinasta kappingarár verið heilt nær Stjørnuni í fleiri dystum, men hvørja ferð hevði Stjørnan tó koppað yvirtakið. Við steypasigrinum fingu Neista-kvinnurnar tó fyrst og fremst broytt um egnu fatan sína. Tær fingu prógv fyri, at tað eisini ber til at vinna týdningarmestu dystirnar, og tí snaraði sjálvsálitið fleiri stig uppeftir hendan dagin.

Samstundis tóktist, sum varð Stjørnan onkursvegna offur fyri kappingarskipanini, sum hevur verið galdandi í ár. Í endaspælinum hevur liðið sum so als ikki havt fyri neyðini at spíla seg út, tí hálvfinaluplássið var undir øllum umstøðum tryggjað. Men tá tað so veruliga stóð á, megnaði liðið ikki at finna »on-knøttin«. Og tá Neistin so eisini streyk avstað við sigrinum bara eina viku eftir steypafinaluna, fóru tær reyðu kanska at ivast í egnari styrki.

Ikki fyrr enn tær fingu knívin á barkan - fyrst í Vági móti VB og síðani í Klaksvík móti Neistanum - tóktist Stjørnan finna rætta stevið framaftur. Og megna tær at finna tað spælið fram í kvøld, verða tær helst meistarar. Men tað krevur altso, at spælararnir raka rætta dagin.

### Lokalt við útlendskum kryddi

Og mótstøðan frá Neistanum skal so sanniliga heldur ikki undirmetast. Hóast liðið ikki tykist eins komplett, sum tað hjá Stjørnuni, so hava tær í verki víst, at tær so sanniliga eisini hava sínar streingir at spæla uppá.

Ikki minst hevur týdningurin av Manuelu Stan Jensen og Nicoletu Radu Hansen verið ovurstórur. Føroyski bulurin á liðnum er góður, men tær báðar hava víst seg sum júst tað eyka kryddið, sum hevur lyft liðið heilt upp móti tindunum. Somikið nær, at tær nú bara eru ein dyst frá fyrstu greipuni í níggju ár.

Umframt útlendska styrkin, so hevur væl uppvandi bulurin av egnum spælarum á sín hátt havt ein ovurstóran týdning fyri liðið. Við eini góðari blanding av royndum og ungum spælarum hevur felagskenslan verið heilt í topp, og tað kann í avgerandi løtunum vera tungan á vágskálini, sum fær spælararnir at stríðast seinasta og týdningarmikla pettið. Tað hevur eisini verið orsøkin til, at tað rutina alla tíðina hava dystast um spælitíð, hevur liðið havt bæði styrki og neyðugu alternativini til at spæla breitt – og harvið økja um trýstið á mótstøðuverjuna. At liðið so eisini hevur góð alternativ á flestu plássunum, hevur eisini betra um møguleikan at rotera, soleiðis at kreftirnar hjá liðnum røkka sum longst. Nakað sum eisini verður neyðugt, nú Birita Wardum noyddist aftur til London undan seinastu finaluni.

### Verjurnar altavgerandi

Hjá báðum pørtum er tað – sum so ofta í hondbólti – verjuparturin, sum verður heilt avgerandi. Við lága máltalinum, sum ofta hevur eyðkent dystirnar hjá Neistanum, er týdningurin í hesum partinum kanska meira sjónligur. Ikki minst, tí styrkirnar hjá Manuelu ofta koma so serstakliga væl fram, tá mótstøðan verður trýst til gjøgnumbrot úr síðunum.

Stjørnan grundar hinvegin stóran part av vandamikla kvika spælinum á eina sterka verju, har umstillingin til álop stemplar við fullari ferð niðaneftir.

Tí verður tað í verjuni, at meistarin í kvøld verður funnin!

## FAKTA

**Dystirnir higartil**

Sjey ferðir í ár hava Neistin og Stjørnan dystast í lands- og steypakapping. Higartil hevur Stjørnan vunnið tær fýra, men tær munnu telja lítið, um Neistin í kvøld javnar til 4-4.

Samstundis kann staðfestast, at sigrarnir hjá Stjørnuni hava verið væl tryggari. Men talan er framvegis um tær sjey uppgerðirnar, sum eru spældar. Dysturin í kvøld er tann, sum setur punktum fyri kappingarárinum, og tá telja fortíðarinnar avrik lítið. Eisini hóast fortíðin bara er fýra ella 10 dagar gomul.

| Dagur | Dystur | | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 05.11.05 | Grundspæl | Stjørnan-Neistin | 28-20 |
| 11.12.05 | Grundspæl | Neistin-Stjørnan | 20-28 |
| 08.01.06 | Endaspæl | Neistin-Stjørnan | 21-25 |
| 11.02.06 | Steypafinala | Stjørnan-Neistin | 14-18 |
| 18.02.06 | Endaspæl | Stjørnan-Neistin | 18-19 |
| 19.03.06 | 1. finala | Neistin-Stjørnan | 19-18 |
| 25.03.06 | 2. finala | Stjørnan-Neistin | 30-23 |
| 29.03.06 | 3. finala | Neistin-Stjørnan | ?-? |

## Vænta nógv fólk

**Bæði Neistin og Stjørnan hava fyri seinastu ferð í ár roynt at rikið viðhaldsfólk hjá felagnum til altavgerandi hondbóltsdystin í kvinnudeildini**


ÁSKOÐARAR

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*


Longu meðan spælararnir hjá Stjørnuni fagnaðust um sigurin í næsta finaludystinum, kundi hallarvarparin lýsa við ókeypis bussferðum til Havnar. Einasta treytin, sum varð løgd við, var at tekning skuldi fara fram áðrenn fráferðina.

Tá vit í morgun høvdu samband norðureftir, tóktust klaksvíkingar eisini rokna við nógvum fólki. Longu í gjárkvøldið var talið á bussum komið upp á tríggjar, og við tekningarfreist til klokkan tvey, kann væl hugsast, at enn fleiri bussar verða settir í koyring.

Hartil kunnu so leggjast mongu klaksvíkingarnir, sum eru búsitandi í Havn, so lítil ivi er um, at útiáskoðararnir verða heilt nógvir í tali á Nabb í dag.

### Máling í høllini

Og eisini hjá Neistin royna tey at gera nógv burturúr. Nú kvinnuliðið hjá felagnum aftur strembar móti ovastu tindunum, hava áskoðararnir til dystirnar verið nógvir í tali í nógvum teimum seinastu dystunum.

Til dystin hesa ferð hevur 75 ára gamla felagið heitt á viðhaldsfólkini um at koma í høllina trý korter undan dystinum, soleiðis at ein ordilig upphiting kann fáast í lag. Eitt nú við at hava andlitsmáling á skránni.

So alt í alt, so bendir tað á, at talan verður um tveir fullsettar vengur í høllini á Hálsi. Ein bláan og ein reyðan, sum báðir fara at gera sítt til at eggja sínum spælarum seinasta pettið móti gullinum.



*Talan verður ivaleyst um fullsetta høll av væl málaðum áskoðarum í kvøld*